Ummæli:

# Vekir áhuga og bøtir munandi um kunnleikan til súgdýrini í útnorðri

*Ummæli av bókini “Villini súgdjór í Útnorðri” (tekstur eftir Dorete Bloch, myndir eftir Edward Fuglø og myndatekstur eftir Jenny Lydersen)*



*Tey trý aftan fyri bókina: Edward Fuglø, sum hevur teknað myndirnar, Dorete Block, ið hevur skrivað bókina og Jenny Lydersen, ið hevur gjørt myndatekstirnar*

**Mynd: John Johannessen**

Í farna ári kom út bókin “Villini súgdjór í Útnorðri”. Bólkurin av lívfrøðilærarum við Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy og við Klaksvíkar HF-Skeiði hevur lisið bókina og loyvir sær við hesum at gera ein samandrátt av teim viðmerkingum, ið vit hava til myndir og tekst. Í stuttum kann sigast, at myndirnar yvirhøvur eru sera góðar, meðan tað er spell, at tann áhugaverdi teksturin í støðum ikki er nóg neyvur.

**1. MYNDIRNAR**

Myndirnar hjá Edwardi Fuglø eru yvirhøvur livandi, nátúrligar og framúr væl teknaðar. Rørsla og dramatikkur eyðkennir myndirnar, men í einstøkum førum sæst ein farri av menniskjagering. T.d. kópamyndirnar minna á kvæðið um kópakonuna. Tað eydnast oftast at fáa fram sereyðkenni hjá teim ymsu súgdýrunum; men bókin er so mikið umfatandi, at tað er nærum ógjørligt at fáa væleydnaðar myndir av øllum dýrumunum. Talan er sjónliga um eitt risastórt og drúgt arbeiði, har myndirnar í nógvum førum eru meira listarligar enn náttúrutekningar. Serliga hvalamyndirnar eru fín listaverk og hartil neyvar. Tú nærum hoyrir sprutt, bløðrur og blástur frá hvalunum - ja, kennir teg staddan undir vatni viðhvørt! Myndirnar av fjallarevinum (s. 164-65) bera tó brá av kettu, og haran á s. 175 er “fitt”, men nakað óneyv viðvíkjandi støddarlutfalli. Samantikið er myndatilfarið á høgum stigi og stendur ikki aftanfyri myndir í nógvum útlendskum bókum av sama slag. Tað má sigast, at Edward hevur tikið seg munandi fram á listarliga økinum, síðan hesar fjølbroyttu gávur hansara so smátt fóru at kaga undan á Klaksvíkar HF-Skeiði, miðskeiðis í 80 árunum!

Við einum so hugvekjandi og flottum myndatilfari, slepst ikki undan, at tú sum lesari fert at vænta tær nógv av tekstinum, samstundis sum at ávís dygdarkrøv verða sett til hann.

**2. TEKSTURIN**

Fyrst má ásannast, at tað er stórhending fyri føroyska náttúrusøgu, at tílíkt umfatandi bókaverk kemur út. Eisini er talan um prentlist á høgum stigi. Tá ið hetta er sagt, eru tó nøkur viðurskifti við tekstinum, ið vit niðanfyri fara at gera viðmerkingar til.

**2.1. Málsligar og námsfrøðiligar viðmerkingar**

Fleiri dømi eru í bókini um, at eldri føroysk heiti innan dýr og dýrahald eru afturkomin til heiður og æru. Her hevur bókin klárt eitt ávíst mentanarligt virði eisini.

Ivasamt er kanska konsekvent at nýta orðið “látra” um paring hjá nógvum ymiskum kópasløgum. Har er so at siga bara láturkópur ,ið “látrast” (parast) inni í látrum.

Tá ið frágreiðingar eru um dýr innan - anatomiskar myndir - er tørvur á, at pílar ella annað frámerki týðuliga vísir, hvat meinast við á myndini (t.d. s. 14) Stabbamyndirnar (s. 18 og s. 105) áttu eisini at havt talseting á, soleiðis at veruligu tølini síggjast og ikki bara verða søgd í tekstinum.

**2.2 Viðvíkjandi nøvnum á dýrum**

Hvussu skal eitt dýr, ið ikki finst í Føroyum eita? Hetta er ofta ein trupulleiki; men bókin kemur oftast væl frá valinum av nýgjørdum nøvnum til “fremmand” súgdýr. Øðrvísi er við dýrum, ið longu eru kend í Føroyum. Skulu gomlu nøvnini nýtast, ella skulu nýggj nøvn fáa innivist? Bókin hevur funnið eina nøkulunda hóskiliga javnvág. Aldargamla føroyska hvalanavnið “bláhvalur” (nú “royður”) átti tó ikki at verið útihýst. Orðið “bláhvalur” er kent og nýtt av føroyskum sjómonnum alla hesa øldina. Haraftrat hevur orðið “royður” eisini merkt “stórhvalur sum heild”. Fiskanøvnini kundu verði betri samskipaði - uttan at blanda føroysk og útlendsk fiskanøvn hvørt um annað. Til dømis “bláhvítingur” tykist meinast við svartkjaft, sum tó eisini verður nevndur í sama andadrátti.

**2.3. Fakligar viðmerkingar og nakrar rættingar**

**Krill**

Ein sera óheppin misskiljing er komin í umrøðuni av høvuðsføðini hjá stórhvali, nevniliga “krill” (s.16). Bókin definerar “krill” sum ein blanding av ymiskum dýrum (veingjasniglar, reyðæti og ljósrækjur). Hetta er skeivt, tí “krill” hevur í hvussu er seinastu uml. 30 árini merkt eina og aleina krabbadýr úr bólkinum Euphausiacea. Bókin gevur Euphausiacea navnið “ljósrækjur”. Hetta er eitt sera villeiðandi val, tí “rækjur” hoyra til bólkin Decapoda, ið lítið og onki hevur við Euphausiacea at gera. Føroyskar skúlabøkur hava áður nýtt orðið “ljóskrabbi” fyri Euphausiacea. Ein annar møguleiki kundi verið “ljósáta” ella “ljósæti”, ið eisini sipar til, at hesi dýr senda út ljós.

Orðið “krill” er haraftrat umsett til “skrið”. Hetta orð fær ein at hugsa um illveður ella at skríða. Hvørki er serliga væl galdandi fyri “krill” - sum svimur skjótt og als ikki skríður! Her tykist sum neyðugt er við eini upprudding viðvíkjandi heitum og nøvnum á havlívfrøðiliga økinum. Eitt upplagt samstarvsprojekt fyri stovnar, ið knýttir eru at havlívfrøðiligum kanningum - og undirvísingarverkinum annars.

**Lívsringrásin hjá rundormum**

Bæði hjá hvali og kópi eru umfatandi skeivleikar komnir í viðíkjand lívsringrásini hjá rundormum, ið liva í fiski, og kunnu enda sum føði hjá hvali ella kópi (s. 17 og s. 104). Hesir skeivleirkar eru so mikið stórir, at Skúlabókagrunnurin átti at sent út rættingarblað. Nøvn á viðkomandi rundormum sum “toskasandmaðkur” og “sildamaðkur” tykjast verða tikin úr leysari luft, umframt at verða skeiv og villeiðandi. At nýta orðið “at víggja” í sambandi við eggframleiðslu hjá maðkum (s.202) og rundormum er neyvan rætt, tí hetta orð verður nýtt um egg frá flogkykti (insektum).

**Annað**

Kortini yvir útbreiðslu av hvali og teksturin um landafrøðina samsvara ikki nóg væl - her eru fleiri dømi. Í umrøðuni av grindaknívinum er hend ein misskiljing. Jørnini á grindaknívi , ið verja hondina, eita ikki hólkur, tí tað er jú hólkurin, ið heldur blaðnum fastum á sjálvum skeftinum. - Ein og hvør knívur uttan hólk hevði verið vandamikil!

Stórhvalurin “seiðhvalur” verður sagdur at hava “stórt horn”. Á yvirlitstalvuni er tó horn hansara ikki størri enn á grindahvali.

Týdningarmikla ljóðsamskifti hjá hvali er komið við. At umseta “ultralyd” (ultra sound) til “yvirljóð” er ikki serliga beinrakið. Fær ein at hugsa um “yvirtónar” innan tónleikin. Hvat við heldur at nýta orðið “háfrekvent ljóð” ella bert “hásveiggjandi ljóð”?

Hvalur verður sagdur bert at kunna køla seg við bøkslum og horni. Ikki heilt beint, tí nakað av køling kann fara fram gjøgnum blóðæðrar í spikinum - eitt slag av “shunti”. Millumbilini millum góð og ring grinda- ella døglinga-ár (100-120 ár) verða nevnd “ringrás”. Eitt sindur óheppin orðing. Kanska heldur nýta orðið “skiftisskeið” fyri Sagt verður á s. 193 at loppurnar á svørtu rottuni elvdu til verstu farsóttina í miðøldini “svartadeyða”. Hetta er ikki heilt rætt, tí tað er jú bakterian Yersinia pestis, ið m.a. livir á svørtu rottuni, ið elvir hesa sjúku. Men loppurnar bera bakteriurnar frá deyðum rottum til fólk.

Læmingur verður umrøddur sum “ágangandi ránsdjór”, hóast hann beint áðrenn er sagdur at vera plantuátari. - Soleiðis kundu vit hildi fram, men lat hetta vera nóg mikið.

**3. SAMANTIKIÐ**

Bókin er ein góð handbók um land- og sjósúgdýr í útnorðri; men sum lærubók er tó nakað eftir á mál. Her áttu meira spurningaorðaði evni at verið tikin við. T.d. trupulleikarnir við tungmetalum og pesticidum í hvali - serliga grindahvali. Spurningurin viðvíkjandi stovnsstødd og nøring hjá ymsum stórhvalum kundi eisini verið tikin fram. Trupulleikarnir við kaving kundu verið meira gjølliga viðgjørdir. Arvakanningar av stovnum hevði verið sera áhugavert at hoyrt meira um.

Keldulistin er stórur og umfatandi, men ein ofta nevnd tilvísing sum “Uppískoyti I og II” er als ikki nevnd í keldulistanum. Hetta kundi verið ein forvitnislig kelda at kanna nærri.

Aftast í bókini er ein hentur orðalisti við ymsum heitum á dýrakropslutum v. m. Listin er eftir okkara tykki nakað stuttur við tað, at ein rúgva av rættiliga óvanligum orðum verða nýtt í tekstinum.

Taka vit samanum fyri bæði styrki og veikleikar við bókini, so er tó høvuðsniðurstøðan tann, at hon vekir áhuga og bøtir munandi um kunnleikan til súgdýrini í útnorðri. Høvuðstrupulleikin er, at Skúlabókagrunnurin skuldi lati føroyskar lívfrøðingar fingið høvi at lisið tílíkt verk, áðrenn tað varð útgivið, soleiðis at fakligar villur í minst møguligan mun komu fyri - í so prýðiligari og dýrari bókaútgávu!

**Dánjal Petur Højgaard, Jákup Eyðun Joensen og Kári Purkhús lívfrøðilærarar við Studentaskúlan og HF-Skeiðið í Eysturoy og Klaksvíkar HF-Skeið**



# Verða revsað fyri gott arbeiði

*– Tað var eitt ótrúliga stórt vónbrot, at Helena Dam á Neystabø ikki megnaði at útvega Suðuroyar Sjúkrahúsi meiri enn 300.000 krónur afturat. Annars er bara talan um at flyta trupulleikarnar og tað er ongin loysn, siga álitisfólk á Suðuroyar Sjúkrahúsi*



*– Hóast tað ikki sær so ljóst út beint nú, hava vit framvegis vónir um, at tað fer at laga seg, siga tey trý álitisfólkini, sum eru vald á Suðuroyar Sjúkrahúsi*

Áki Bertholdsen

–Hetta verður eitt sera stórt bakkast fyri sjúklingarnar, tí nú fer tað ikki at bera til at geva teimum tað viðgerð, sum teir hava krav uppá.

Á Suðuroyar Sjúkrahúsi er hýrurin ringur.

Hýrurin var ringur, tá ið fíggjarlógin fyri 2000 var samtykt.

Og hann er ikki batnaður stórvegis, nú Karsten Hansen hevur lagt uppskot um eykajáttanarlóg fyri tingið.

Hýrurin er ringur tí at játtanin, sum Sjúkrahúsið fær, er ikki nóg stór til at varðveita virksemið á sama støði, sum tað var á í fjør.

Og tað fer at fáa álvarsligar avleiðingar, tí frammanundan er longu so nógv spart, at raksturin er á einum so lágum støði sum yvirhøvur tilber og tað á øllum økjum.

Sostatt ber ikki til at siga nakað starvsfólk upp, uttan at tað fær avleiðingar fyri sjúklingarnar.

Tey siga, at Suðuroyar Sjúkrahús hevur altíð verið rikið so bíliga, sum yvirhøvur gjørligt.

– Men nú sær út til, at hetta skal koma okkum aftur um brekkur og at vit skulu revsast fyri at hava gjørt eitt gott arbeiðið árini frammanundan.

Støðan verður mett at verða so mikið álvarslig, at álitisfólkini á Suðuroyar Sjúkrahúsi gjørdi av at velja eina trýmanna nevnd at arbeiða víðari við málinum.

M.a. skuldi nevndin royna at sannføra politikararnar um, at tað ber ikki til at skerja raksturin á sjúkrahúsinum, uttan at tað fer at fáa álvarsligar avleiðingar

Men nú eykajáttanarlóg varð lagt fyri tingið mugu tey trý, Maria Vágfjall, Charles Kristensen og Bergur Stórhamar, ásanna, at teirra arbeiðið hevur ikki borið stórvegis frukt.

Tí á eykajáttanarlógini er ikki ætlanin, at Suðuroyar Sjúktahús skal fáa meiri enn 300.000 krónur afturat til lønir.

Harumframt skulu 700.000 krónur flytast frá øðrum rakstri til lønarjáttanina.

Men tað halda tey trý lítið um.

– Hetta er ikki annað enn at flyta trupulleikan frá einum øki yvir á eitt annað øki.

Tey stúra heldur ikki sørt fyri, hvaðani á rakstrinum hesar 700.000 krónurnar skulu takast.

– Skal hitin setast niður, ella skal tað sparast á játtanini til mat? ella hvar, spyr Bergur Stórhamar.

Tey skoyta uppí, at hetta er tað sama sum at siga, at vit hava tað ov heitt, ella eta ov nógv, og tað fáast tey ikki at siga.

– Ella fer tað at ganga útyvir eftirútbúgvinga, so verður tað ein ólukka, sum eisini fer at raka sjúklingarnar, siga tey trý álitisfólkini.

**Verða hart rakt**

Fyribils hava sparingarnar á Suðuroyar Sjúkrahúsi ført við sær, at 4,5 fólk eru søgd upp.

Talan er um 1/2 fólk í køkini, eitt fólk á teknisku deild og leiðbeiningin er niðurløgd, tí tað eina fólki, sum arbeiddi har, er sagt upp. Harafturat verður tann ambulanta fysioterapiin niðurløgd og av tí sama eru tveir fysioterapeutar uppsagdir.

Serlig hesar uppsagnirnar fara at raka sjúklingarnar hart.

– Eitt nú missa teir sjúklingarnir, sum ganga til ambulanta viðgerð tann heita hylin, sigur Maria Vágfjall

– Harumframt verður bara teir privatu fysioterapeutarnir at dúva uppá. Men teir báðir, sum eru, arbeiða ikki fulla tíð og hava tí neyvan orku til at átaka sær alla viðgerðina.

– Men tað er heldur ongin trygd fyri, at teir privatu fysioterapeutarnir hava møguleika at viðgerða fólk í somu raðfylgju, sum læknarnir vildu havt tað.

– Annars verða sjúklingarnir noyddir til Havnar til viðgerðar.

Sostatt verður fysioterapeutiska viðgerðin hereftir í nógv størri mun ein fíggarligur spurningur fyri sjúklingarnar, og tað var neyvan ætlanin við heilsutænastunum í Føroyum.

Maria Vágfjall sigur, at samanumtikið fer sparingin á fysioterappini at føra við sær, at tilboðini til sjúklingarnir fara at verða munandi verri, enn tey hava verið.

At ein teknikari nú er uppsagdur er eisini sera óheppið, tí nú er øll trygdin burtur aftaná vanliga arbeiðstíð.

–Verður eitt tól, ella okkurt annað í óstandi aftaná vanliga arbeiðstíð, er ongin at gera tað aftur. Er nakað álvarsligt áfatt, kann einhvør hugsa sær til, hvat kann henda, siga tey trý álitisfólkini.

At leiðbeiningin verður løgd niður fer eisini at gera umstøðurnar nógv truplari, tí nú er ongin at vísa øllum teimum mongu á leið, sum koma inn á sjúkrahúsið um dagarnar til viðgerð ella kanningar av ymsum slag, ella í øðrum ørindum.

Tey siga, at tað mann vera ógvuliga ivasamt, um nøkur sum helst sparing er í hjá sjúkrahúsinum at noyðast at keypa tær tænastur uttanifrá, sum verða niðurlagdar á sjúkrahúsinum, tí tað kostar eisini.

– Talan er eisini í mongum førum um hátøknilig tól, sum ikki ein og hvør kann gera ístand.

**Hava roynt**

Tey trý siga, at tey hava roynt at sannført Helenu Dam á Neystabø um týdningin av játta Suðuroyar Sjúkrahúsi meiri pening, so at virksemið kann varðveitast óbroytt.

Men higartil hevur tað verið til fánýtis.

Og tey dylja ikki fyri, at tey eru ógvuliga vónbrotin av, at tað ikki hevur eydnast henni at útvega sjúkrahúsinum meiri enn 300.000 krónur afturat.

– Men eitt, sum vit hava fingið burturúr henni, er, at hon vísir tí aftur, sum Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, førdi fram á fundi á Suðuroyar Sjúkrahúsi herfyri.

Tá segði hann, at landsstýrismaðurin skuldi hava fingið at vita fleiri ferðir, bæði á landsstýrisfundi og á samgongufundi, at ongin skuldi sigast upp á Suðuroyar Sjúkrahúsi, sigur Charles Kristensen.

Tey trý siga, at nú landsstýrismaðurin ikki megnar at bjarga støðuni, mugu tey seta sítt álit á, at løgtingið tekur um endan.

Og tey seta sítt álit á, at andstøðan enn einaferð ferð at royna at gera sína ávirkan galdandi, eins og hon gjørdi, tá ið fíggjarlógin var til atkvøðugreiðslu beint upp undir nýggjár.

Men tey seta eisini sítt álit til tinglimir úr samgonguni, Eitt nú seta tey sítt álit á, er Sámal Petur í Grund, tí í samrøðu við Sosialin herfyri helt hann, at heilsuverkið og Strandferðslan mátti raðfestast hægri enn avlopið á fíggjarlógin.

Ein annar tinglimur, sum tey seta sítt álit á, er einasti samgongumaðurin úr Suðuroynni, Hergeir Nielsen, sum hevur sagt, at uppsagnirnar á Suðuroyar Sjúkrahúsi skuldi takast aftur.

– Men ikki minst seta vit okkara álit á Jógvan við Keldu.

– Tá ið fíggjarlógin varð samtykt, kundi hann ikki atkvøða fyri hægri játtan til Suðuroyar Sjúkrahús, tí uppskotið um tað var komið ov seint á borðið. Og tað er so ikki støðan nú, siga Maria Vágfjall, Charles Kristensen og Bergur Stórhamar.

## Ferðsluvanlukka í Øravíkarlíð kravdi eitt mannalív

*Ein ung genta doyði á staðnum, tá bilurin hon koyrdi í rendi saman við ein lastbil í Øravíkarlíð gjáramorgunin*

Sveinur Tróndarson

Suðuroyggin varð enn einaferð rakt av einum ferðsluskelki fyrrapartin í gjár. Ein ung genta, sum í bili var á veg í skúla við Miðnámsskúlan í Vági, varð árend av einum lastbili, sum var á veg norðureftir. Gentan doyði á staðnum.

**Skifti breyt**

Av tí at eingi vitni vóru til sjálvt óhappi, sum hendi stutt eftir klokkan átta í gjáramorgunin, við kirkjugarðin í Øravíkarlíð, veit løgreglan í Suðuroy ikki heilt vist, hvussu ólukkan hendi.

– Men fyribils vita vit, at lastbilurin, sum var á veg norðureftir, fór yvir í breytina hjá persónbilinum, sum var á veg suðureftir. Hví tað hendi vita vit ikki, men kanningarnar higartil vísa, at tað neyvan er talan um ov høga ferð, verður sagt av løgregluskrivstovuni á Tvøroyri.

Løgreglan greiðir frá, at tá lastbilurin fór yvir í hitt borðið rendi hann inn í síðuna á bilinum og skrædlaði hann ein stóran part av síðuni.

– Ein slík vanlukka er so ógvuslig, tí ein lastbilur er so øgiliga tungur. Og hetta er uttan iva nakað, sum er komið heilt óvart á tey bæði, tí tað vóru eingi bremsispor at síggja á vegnum, sigur løgreglan.

**Lastbilurin eisini stóran skaða**

Eftir at hava rent á persónbilin helt lastbilurin leiðina fram yvir um vegin, legði ein lyktapela niður áðrenn hann endaði í veitini. So tungur sum ein slíkur lastbilur er, so skrædnaði foraksilin og bæði framhjólini og tey endaðu afturi undir bilinum, greiðir løgreglan frá.

Hóast løgregla og sjúkrabilur komu á staðið alt fyri eitt, so var einki at gera. Gentan var deyð á staðnum og har var einki, sum hjálparfólkið kundi gera.

Førarin á lastbilinum fekk bert smávegis snuddir umframt at hann fekk sær ein skelk fyri lívið.

Hetta er onnur syndarliga ferðsluvanlukka, sum hendir á leiðini við Øravík innan stutta tíð.

TILBOÐ

Frá leygardegnum 11/3 til 18/3 lata vit:

÷10% av stálvaskum

÷20% av øllum kranum



Tilboðini eru eisini galdandi í Runavík teir dagar opið er.
Vit hava eisini stórt úrval av bæðirúmsmøblum.

VVS-HORNIÐ
Lágpríshandil

Landavegur 2 - 100 Tórshavn - Tel. 318023 - Fax 310963

Runavík • Tel. 447773 Opið: Mikud.....13.00-17.30
Leygard. 10.00-14.00

Sosialurin - 311820